Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

– MAI 2023

# Fíggjarligt støðufesti

## 1. ársfjórðing 2023

**Í mars 2023 var útlánsvøksturin 5,5% hjá føroysku bankunum og 2,6% tá ið danskir fíggjarstovnar verða taldir uppí. Rentuútreiðslurnar hjá føroyskum sethúsaeigarum eru øktar við 12% í 2022 samanborið við árið fyri.**

### *Vøksturin í útlánum*

Føroysku bankarnir høvdu útlán fyri 17,65 mia. kr. í mars 2023 til føroyskar kundar. Í mars í fjør vóru útlánini 16,65 mia. kr.; tey eru tí økt við 1. mia. kr. í hesum tíðarskeiði. Vøksturin í útlánunum hjá føroysku bankunum var 5,5% í mars 2023, roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal í mun til sama tíðarskeið árið fyri[1]. Útlánsvøksturin hjá føroysku bankunum er øktur støðugt síðani august 2022, sí mynd 1.

*Mynd 1. Útlánsvøksturin øktur hjá føroysku bankunum*

**Útlánsvøkstur**
Árligur vøkstur, %, roknað sum glíðandi miðal av 3 mðr.




Kelda: MFI, Landsbanki Føroya. Føroyskir kundar, millumbanka útlán ikki íroknaði.

Útlánini frá donsku realkredittstovnunum til føroyingar eru hinvegin minkaði við góðum 100 mió. kr. hetta seinasta árið; í mars 2022 vóru tey 3,9 mia. kr. tilsamans og í mars 2023 vóru tey 3,8 mia. kr.

Meginparturin av útlánunum hjá donsku realkredittstovnunum er til sethúsafígging til føroysk húsarhald. Danskir peningastovnar læna eisini út til føroyingar, og tað er í størstan mun privata vinnulívið, ið lænt verður til, og síðani ein minni upphædd til føroysk húsarhald. Útlán frá donskum peningastovnum til føroyskar kundar eru lækkaði við nærum 350 mió. kr. síðani mars

[1] Útlánini sveiggja frá mánað til mánað og útlánsvøksturin verður tí roknaður sum eitt miðaltal yvir 3 mánaðar. Útlánsvøksturin í mars 2023 er sostatt roknaður sum miðalið av útlánunum í jan-feb-mar í mun til miðalið av útlánunum í sama tíðarskeiði árið fyri.

2022; tey vóru 465 mió. kr. í mars 2023 (ikki víst í mynd 1).

Tilsamans eru útlánini til føroyingar sostatt netto økt við 550 mió. kr. frá føroyskum og donskum fíggjarstovnum tilsamans í tíðarskeiðinum mars 2022 til mars 2023. Útlánini vóru nærum 22 mia. kr. tilsamans í mars 2023 og útlánsvøksturin frá føroysku og donsku peninga- og realkreditt-stovunum tilsamans var 2,6% í mars 2023 roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal í mun til sama tíðarskeið árið fyri.

Ein partur av vøkstrinum í útlánunum hjá føroysku bankunum stavar frá øktum útlánum til privatu vinnuna. Útlánsvøksturin var 7,3% til privatu vinnuna í mars 2023 roknað sum eitt miðaltal yvir 3 mánaðar, og tað vóru í størsta mun tilfeingis- og framleiðsluvinnurnar, sum togaðu vøksturin í útlánunum upp.

Í tilfeingisvinnunum var tað økt útlánsvirksemi til fiskivinnuna, sum togaði útlánsvøksturin upp; samlaðu útlánini til fiskivinnuna vóru umleið 1,1 mia. kr. í mars 2023.

Í framleiðsluvinnunum vóru tað vinnur innan el-veiting, sum togaðu útlánsvøksturin upp (eitt nú til vindmyllur), meðan vøksturin í útlánum til byggivinnu og framleiðslu var positivur, men ikki eins stórur, sum tann til el-veiting. Útlánini til framleiðsluvinnurnar vóru 1,5 mia. kr. tilsamans frá føroysku bankunum í mars 2023.

Útlánsvøksturin til tænastuvinnuna í síni heild var negativur í mars 2023, av tí at útlán til gisti- og matstovuvinnuna eru minkaði síðani mars 2022, men hann var hinvegin positivur til eitt nú handil og flutning og bygging av fastognum. Útlánini til tænastuvinnuna vóru 3,5 mia. kr. tilsamans í mars 2023.

Afturat útlánum til privatu vinnuna, høvdu føroysku bankarnir útlán til almennar fyritøkur fyri 400 mió. kr.; tað vil siga, at útlánini til vinnuna tilsamans vóru 6,5 mia. kr. í mars 2023.

Útlánsvøksturin til húsarhaldini er minkaður hjá donsku realkredittstovnunum (sí mynd 1), meðan hann er øktur hjá føroysku bankunum. Ein orsøk kann vera, at føroysku húsarhaldini velja føroysk bústaðarlán framum donsk realkredittlán, nú ið rentan á fastrentaðum realkredittlánum er økt nógv í 2022. Útlánsvøksturin var 7,1% hjá føroysku bankunum til húsarhaldini í mars 2023 roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal í mun til sama tíðarskeið árið fyri.

Saman við útlánum til tað almenna (í stóran mun kommunurnar) á 1,4 mia. kr., til húsarhaldini á 9,6 mia. kr., til vinnuna á 6,5 mia. kr., og fíggjarligar fyritøkur á 150 mió. kr., vóru útlánini tilsamans 17,65 mia. kr. hjá føroysku bankunum til føroyskar kundar í mars 2023.

### *Innlánini hækka framvegis*

Innlánini frá føroyskum kundum í føroysku bankunum eru økt við góðum 1,2 mia. kr. í tíðarskeiðinum mars 2022 til mars 2023, tá samlaðu innlánini vóru 19,2 mia. kr.

Húsarhaldini eiga meginpartin av innlánunum og tey hava økt síni innlán við góðum 150 mió. kr. í hesum tíðarskeiði til nærum 12,8 mia. kr. í mars 2023. Vinnan hevur í sama tíðarskeiði økt síni innlán við góðum 800 mió. kr. og tey vóru 4,8 mia. kr. í føroysku peningastovnunum í mars 2023, meðan tað almenna hevur økt síni innlán við 300 mió. kr. í sama tíðarskeiði.

### *Innlánsyvirskotið er óbroytt*

Innlánsyvirskotið í føroysku bankunum var 1,4 mia. kr. í mars 2023. Innlánsyvirskotið eru innlán hjá føroysku peningastovnunum íroknað útlendskar deildir, frátrekt útlán hjá somu. Innlánsyvirskotið var nærum 1,5 mia. kr. í mars 2022 og innlánsyvirskotið er tískil ikki broytt stórvegis hetta seinasta árið. Innlánsyvirskotið er munandi lægri, enn áðrenn februar 2021, tá danska deildin hjá BankNordik varð seld frá, sí mynd 2.

Húsarhaldini eiga meginpartin av innlánsyvirskotinum í føroysku bankunum; tað var nærum 3,2 mia. kr. í mars 2023. Eitt ár frammanundan; í mars 2022, var innlánsyvirskotið hjá húsarhaldunum 3,7 mia. kr. Møguliga er inflasjónin og økta rentustøðið orsøk til, at húsarhaldini hava minkað um uppsparingina (lægri innlán) í føroysku bankunum hetta seinasta árið, tí innlánsyvirskotið hjá húsarhaldunum hevur annars verið støðugt veksandi seinastu 10 árini.

Húsarhaldini hava eitt innlánsundirskot á umleið 500 mió. kr. tilsamans, tá ið skuldin í donskum realkredittstovnum verður tald upp í.

*Mynd 2. Innlánsyvirskotið í føroysku bankunum*




Kelda: Landsbanki Føroya. Frároknað inn- og útlán til aðrar fíggjarstovnar.

Privata vinnan skyldar meira, enn hon hevur innistandandi í føroysku bankunum. Privata vinnan hevði í mars 2023 eitt innlánsundirskot á nærum 1,9 mia. kr. sum er eitt vet minni, enn í mars 2022, tá innlánsundirskotið var nærum 2,1 mia. kr. Tað er í størsta mun tilfeingisvinnurnar, sum hava bøtt um innlánsundirskotið við at hækka síni innlán í føroysku bankunum.

Framleiðsluvinnurnar hava eisini bøtt um innlánsundirskotið við at økja um síni innlán. Hóast tænastuvinnurnar hava sett meira av peningi inn á konto í føroysku bankunum í tíðarskeiðinum mars 2022 til mars 2023, er innlánsundirskotið blivið størri hjá tænastuvinnunum, tí tær í sama tíðarskeiði hava økt enn meira um lántøkuna í føroysku bankunum.

Eisini almenni geirin hevur samanlagt størri útlán enn innlán í føroysku bankunum, men landið og sosialu grunnarnir hava positiv innlánsyvirskot, meðan kommunurnar hava innlánsundirskot. Innlánsundirskotið hjá kommununum var 1,2 mia. kr. í mars 2023 og er økt við 80 mió. kr. síðani mars í fjør.

### *Samanumtøka um útlán og innlán*

Vøksturin í útlánum til føroyskar kundar frá føroysku bankunum var 5,5% í mars 2023 og 2,6% tá donsku peninga- og realkredittstovnarnir teljast uppí. Føroysku bankarnir hava økt útlánini við 1 mia. kr. í tíðarskeiðinum mars 2022 til mars 2023, meðan fíggingin er minkað við 100 mió. kr. frá donsku realkredittstovnunum og við 350 mió. kr. frá donsku peningastovnunum hetta sama tíðarskeiðið. Útlánini til føroyingar eru sostatt netto økt við 550 mió. kr. hetta tíðarskeiðið.

Innlánsyvirskotið í føroysku bankunum var nærum óbroytt í tíðarskeiðinum mars 2022 til mars 2023. Húsarhaldini eiga meginpartin av innlánsyvirskotinum í føroysku bankunum, og tað er minkað við 500 mió. kr. í sama tíðarskeiði. Privata vinnan hevur innlánsundirskot í føroysku bankunum, men tilfeingis- og framleiðsluvinnurnar hava bøtt um innlánsundirskotið hetta tíðarskeiðið.

# Eftirlønaruppsparing

Føroysk húsarhald eiga privata eftirlønaruppsparing í Føroyum fyri 9,3 mia. kr. (2022) , sí mynd 3. 2,2 mia. kr. standa í føroysku bankunum, og av hesum eru 1,6 mia. kr. forskattaðar, meðan 600 mió. kr. skulu skattast við útgjald eftir gomlu skipanini. Í føroysku tryggingar- og pensjónsfeløgunum standa 7,1 mia. kr., har 4 mia. kr. eru

forskattaðar og 3,1 mia. kr. skulu skattast við útgjald.

*Mynd 3. Eftirlønaruppsparing er veksandi*




Kelda: Landsbanki Føroya.

Afturat privatu uppsparingini í Føroyum eiga summir føroyingar eftirlønaruppsparing í donskum pensjónsfeløgum, og hendan upphædd er mett til at vera umleið 2,3 mia. kr. Verða hesar 2,3 mia. kr. lagdar afturat uppsparingini í Føroyum á 9,3 mia. kr., var samlaða privata eftirlønaruppsparingin hjá føroyingum 11,6 mia. kr. í 2022.

Nógv spara longu 15% upp til egnu eftirløn, men í 2014 varð álagt øllum føroyingum at rinda til privata eftirløn. Á fyrsta árið var gjaldið 1% og síðani er gjaldið hækkað so líðandi og røkkur tað í 2026 12%. Í 2023 er tvungna gjaldið 9%.

Síðani 2012 hevur verið skattað við inngjald. Í 2020 var tað akkurát helvt um helvt, sum var ávikavist forskattað og skuldi skattast við útgjald; men síðani 2021 hevur forskattaði parturin verið størstur, sí mynd 3.

Føroyingar fáa eisini útgjald frá arbeiðs-marknaðareftirlønargrunninum, men hetta verður ikki talt við í uppgerðini av privatu upp-sparingini av tí at AMEG er ein *pay-as-you-go* skipan[2]. Harafturat fáa summir føroyingar tænastumannapensjón, men hesar verða heldur ikki taldar við, eftirsum tær eru ein veiting, ið landskassin rindar.

Samanumtikið eiga føroyingar privata eftirlønaruppsparing fyri 11,6 mia. kr. og tað svarar til 46% av BTÚ í 2022.

# Rentuhækkingar

Renturnar eru hækkaðar støðugt í 2022 og tað er fyrstu ferð, at renturnar eru hækkaðar í mong ár, sí mynd 4.

*Mynd 4. Rentan er økt lutfalsliga nógv*




Viðm.: Miðalrenta, bústaðarlán hjá føroyskum húsarhaldum (løntakarar, pensjónistar vm., NPISH ikki íroknaði) í føroyskum bankum og donskum realkredittstovnum (íroknað bidrag). Stabbarnir vísa hvussu nógv miðalrentan er broytt í mun til sama mánað árið fyri; td. jan. 2023 í mun til jan. 2022. Kelda: Landsbanki Føroya.

Árliga broytingin í miðalrentuni[3] á bústaðarlánum hjá føroysku húsarhaldunum[4] var 0,89 prosentstig í januar 2023 í mun til januar 2022. Í januar 2022 var miðalrentan 2,61% á bústaðarlánunum í føroysku bankunum og donsku realkreditt-stovnunum tilsamans, og í januar 2023 var miðalrentan 3,5%; hon er sostatt økt 0,89 prosentstig.

[2] Ein *pay-as-you-go* skipan merkir, at hvør einstakur ikki fær útgoldið tær upphæddir, ið hann sjálvur hevur spart saman (goldið inn) í skipanina. Ístaðin verður goldið út til teirra, sum hava rætt til AMEG, samstundis sum fólk, ið eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, gjalda inn í skipanina.

[3] Útlánsrentan í % pa er roknað við fortreyt um kvartárliga rentutilskriving við hesum frymli:

$$r_u = \left[ \left(1 + \frac{q}{m} * \frac{R_u}{U}\right)^{\frac{365}{q}} - 1 \right] * 100$$

$R_u$: rentuupphædd, ið er komin afturat útlánum í mánaðinum.
$U$: útlánsupphædd roknað sum miðal av dagligari saldo í mánaðinum.
$q$: tal av døgum í viðkomandi ársfjórðingi.
$m$: tal av døgum í viðkomandi mánaði.

[4] NPISH eru ikki íroknaði.

Rentuútreiðslurnar hjá føroysku sethúsa-eigarunum eru øktar góðar 34 mió. kr. í 2022 í mun til í 2021, sum svara til 22 mió. kr. tá ið rentustuðulin er drigin frá.[5] Tað er ein vøkstur á 12% í mun til tað, sum var goldið í rentum á bústaðarlánum í 2021. Sostatt eru livikostnaðirnir hjá føroyingum ikki bert øktir av inflasjón hetta seinasta árið, men eisini av rentuhækkingum.

Dýrkaðu lánikostnaðirnir eru millum annað við til at ávirka prísgongdina á sethúsamarknaðinum; sethúsaprísirnir hava verið lækkandi síðani annan ársfjórðing 2022, men eru øktir aftur í fyrsta ársfjórðingi 2023, sí mynd 5. Hinvegin; um fyrsti ársfjórðingur 2023 verður samanborin við fyrsta ársfjórðing í 2022, vóru sethúsaprísirnir í Tórshavn tó 12% lægri.

*Mynd 5. Sethúsaprísirnir eru lækkaðir í Tórshavn*




Kelda: BankNordik.

Eins og øktar rentuútreiðslur og inflasjón kunnu ávirka bjartskygnið og harvið nýtsluna hjá húsarhaldunum, kann tað hava neiliga ávirkan, tá ið sethúsaognin fellur í virði. Miðalsethúsa-prísurin í Tórshavn er farin frá nærum 3,9 mió. kr. í fyrsta ársfjórðingi 2022 til 3,4 mió. kr. í fyrsta ársfjórðingi 2023.

Sethúsaprísurin í fyrsta ársfjórðingi 2023 skal tó takast við fyrivarni, tí prísurin er eitt miðal av lutfalsliga fáum sølum. Í árunum 2010 til 2021 hava tað verið umleið 40 sølur í miðal Tórshavn í hvørjum ársfjórðingi, men tað seinasta árið (frá 1. apríl 2022 til 31. mars 2023) hava tað einans verið nærum 20 sølur í miðal í hvørjum ársfjórðingi.

Allarhelst hava húsarhaldini verið eitt vet meira varin, tá tey hava umhugsað húsakeyp hetta seinasta árið, meðan prísirnir á gerandisvørum og lánikostnaðirnir eru vaksnir lutfalsliga nógv.

Renturnar, sum føroysku bankarnir bjóða sínum kundum, fylgja rentuni hjá Nationalbankanum, ið fylgir rentuni hjá evropeiska miðbankanum, ECB. ECB hevur framt fleiri rentuhækkingar á rað í 2022 fyri at basa inflasjónini, og í løtuni verður mett, at ECB fer at hækka rentuna tvær ferðir afturat í 2023[6]. Av tí, at 86% av sethúsaskuldini hjá føroysku húsarhaldunum hevur broytiligari rentu,[7] verða flestu sethúsaeigararnir í Føroyum raktir beinanvegin, tá ið rentan hækkar.

[5] Roknað er við einum rentustuðuli á 35% av samlaðu sethúsaskuldini og at eingin rakar stuðulsloftið (tað vil siga tá ið stuðul ikki verður latin rentuútreiðslum omanfyri 100.000 kr. árliga).

[6] The ECB Survey of Professional Forecasters – Report Q2 2023, www.ecb.europa.eu.

[7] Mars 2023, MFI. Landsbanki Føroya.

Landsbanki Føroya *er ein óheftur almennur stovnur, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti, tað vil siga einum tryggum fíggjarkervi og einum høgum kredittvirði í Føroyum.*